# Kjak



*Føroya Handverksmeistarafelag*
**Magnus Magnussen, formaður**

## Viðmerkingar frá Føroya Handverksmeistarafelag til Landsverk

*Landsverk skal ikki tryggja kappingina í byggivinnuni, men vera ein kompetentur innkeypari. Kappingarráðið hevur ábyrgdina av at tryggja kappingarstøðuna sum heild.*

Í ársfrágreiðing síni vísir Landsverk á, at tað ikki altíð er ein fyrimunur at bjóða arbeiðir út í almennari kapping. Somuleiðis verður víst á, at ein tann størsti trupulleikin er, at tað ikki er kapping um arbeiðir tí føroyski marknaðurin er so lítil.

Hetta vil Føroya Handverksmeistarafelag avvísa.

Føroyska handverksvinnan er ein sera liberal vinna har nærum eingi krøv eru til tann, sum vil bjóða seg fram at byggja. Kappingin í byggivinnuni er serstakliga hørð og eru nógv dømir um, at metti prísurin fyri eitt arbeiðið hevur ligið langt oman fyri kostnaðin, tá útbjóðingin er av. Nevnast kann kappingin um at byggja flogvøllin umframt í fleiri førum tá eitt nú almenn og kommunal vegarbeiðir eru boðin út. Eitt er tó heilt vist, verða arbeiðir ikki boðin út, so verður føroyski marknaðurin enn minni enn hann er í dag.

Landsverk vísir á, í viðtalu við Sosialin, at fermetraprísurin á Miðnámsskúlanum í Suðuroynni endaði á 30.000 kr, orsaka av manglandi kapping í byggivinnuni. Hetta er ikki rætt. Orsøkin er ikki manglandi kapping í byggivinnuni, men orsaka av manglandi stýring av verkætlanini frá almennari síðu, t.e. Landsverk. Henda verkætlanin var nevniliga ikki boðin út, men gjøgnumførd eftir samráðing millum Landsverk og ein einstakan arbeiðstakara.

Tað eru fleiri dømi um verkætlanir – bæði røktarheim og skúlar – har fermetraprísurin hevur ligið undir 20.000 kr. fermeturin – eisini í tíðarskeiðum við stórum virksemi í samfelagnum. At geva byggivinnuni kollektiva ábyrgd fyri verkætlanir, sum ikki hava gingið sum ætlað, er óskilligt og rættuliga ósakligt.

At Landsverk grundgevur við, at tað er orsaka av, at verkætlanirnar verða bjóðaðar út, at kostnaðurin gerst alt ov høgur, tí ov lítil kapping er, er rein undanførsla. Hetta kann ikki lesast øðrvísi enn, at hetta verður gjørt fyri at billa fólki og politikarum inn, at betri er um alt størri partur av bæði ráðgeving og bygging skal vera á almennum hondum!

Føroya Handverksmeistarafelag vil vísa á, at tað, sum stórur saknur er á, er einum kompetentum innkeypara, sum er førur fyri at stýra stórum verkætlanum. Lat so Kappingarráðið taka sær av kappingarstøðuni á føroyska byggimarknaðinum!



**Ingi Joensen**
*formaður í Føroysk Myndlistafólk*

## Listafólk vilja hava longri freist

Føroysk Myndlistafólk viðurkenna, at Tórshavnar kommuna er í broddinum, vísir ábyrgd og framsókn, tí kommunan hevur avgjørt altíð at avseta ein part av byggikostnaðinum til listprýðing av teimum kommunalu bygningunum.

Kortini hava ta seinastu tíðina verið nøkur útboð, har myndlistafólkini, hava fingið nógv verri treytir enn aðrir veitarar til bygningsverkætlanir í Tórshavnar kommunu. Hetta hevur serstakliga víst seg við stuttum tíðarfrestum, har krøvini til listarliga dygd, tær teknisku loysnirnar og realistisku prísmetingarnar neyvan kunnu lúkast. Uppskotini gerast tí hastverk og úrslitið ikki tað best hóskandi.

Hetta kundi týtt upp á, at Listabólkurin hjá Tórshavnar kommunu ikki hevur neyðugu serfrøðina til at døma um, hvørjar treytir skulu vera, fyri at listafólk kunnu veita verkætlanir, sum hóska til verandi byggiverkætlanir. Føroysk Myndlistafólk heita tí á kommununa um at víðka Listabólkin við hesi serfrøðini.

Føroysk Myndlistafólk loyva sær tí at gera vart við fylgjandi í sambandi við kappingina útskrivað tann 22-4-2010 um Fimleikastandmynd í Gundadali:

Tíðarfrestin, 22. apríl til 25. mai er ov stutt.

Nevndin, sum velur út, skal víðkast við fólki við serfrøði innan fyri myndlistaøki, til dømis eitt listafólk ella ein listfrøðing.



**Johan Petersen**

## Seriøst svar upp á tápuligan spurning?

*Onki kann hava minni áhuga enn at vita, hvat ein sambandsmaður hevði hildið um eitt úrslit, sum hevði verið eitt annað, enn tað veruliga var. Allíkavæl tvíheldur Zakarias Wang um, at hann vil hava svar upp á henda tápuliga spurningin. Well, skal royna at svara honum, men ber tað til at svara seriøst upp á ein tápuligan spurning?*

Í tveimum førum stillar Zakarias Wang mær spurningin, hvat eg hevði hildið um úrslitið á fólkaatkvøðuni í 1946, um tað var eitt annað, enn tað veruliga var:

1. Um loysingin fekk 49,3% og stórnaruppskotið 50,7% (veruliga úrslitið var 47,2% fyri stjórnaruppskotinum, 48,7% fyri loysingini, 4,1% vóru ógildugar atkvøður og valluttøkan var 66,4%) ella
2. Um loysingin fekk 5.499 atkvøður og stjórnaruppskotið 5.660 atkvøður (veruliga úrslitið var 5.499 atkvøður fyri stjórnaruppskotinum, 5.660 atkvøður fyri loysingini, 478 atkvøður vóru ógildugar, 11.637 vóru á vali og vælrætt høvdu 17.216)

Í báðum førum »gloymir« ZW (við vilja?) ógildugu atkvøðurnar. Hetta broytir jú spurningin, soleiðis, at verða hesar atkvøður, sum í ein stóran mun helst hava verið »nei«-atkvøður eftir áheitan frá formanni Fólkafloksins Thorstein Petersen, tiknar við, sum rímuligt er, verða prosentini ávikavist 47,2 og 48,7 og soleiðis fær hvørki av uppskotunum fleirtal.

Verða ógildugu atkvøðurnar ikki tiknar við, verður talan um eitt evarska lítið simpult fleirtal og eitt stórt simpult ikki-fleirtal. Men talan skuldi sambært Th. Petersen ikki verða um simpult, men kvalifiserað fleirtal (helvt av øllum atkvøðum).

Tí broytir spurningurin hjá ZW onki upp á úrslitið og heldur ikki upp á svarið, hóast hann ikki virðir ógildugu atkvøðurnar og um hann so vendir øllum á høvdið og letur stjórnaruppskotið fáa fleiri atkvøður enn loysingin, tí

- Th. Petersen hevði lovað, at »nei«-atkvøðurnar skuldu telja við, enntá sum gildugar,
- Th. Petersen kravdi kvalifiserað fleirtal,
- bæði Th. Petersen og Andras Samuelsen, formaður Sambandsfloksins, søgdu undan fólkaatkvøðuna, at fólkaatkvøðan skuldi vera vegleiðandi,
- allir flokkar, eisini Fólkaflokkurin, góðtóku, at danska stjórnin sendi tingið heim og útskrivaði nýval. Bert ein ekskluderaður javnaðartingmaður góðtók ikki hetta.